Beinta Løwe Jacobsen
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um Brexit og donsk skip í føroyskari fiskivinnu, settur løgmanni, Bárði á Steig Nielsen, (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Hvat samskifti hevur verið millum landsstýrið og donsku stjórnina um at loyva donskum skipum í føroyskan sjógv at fiska?
2. Hava løgmaður ella nakað av landsstýrisfólkunum fingið fyrispurningar, áheitarnir ella annað frá donsku fiskivinnuni um málið?
3. Kann løgmaður greiða frá, um donsk reiðarí eiga í skipum, sum í seinastuni eru komin inn í føroysku fiskivinnuna?

Viðmerkingar:

Um ongin avtala er gjørd millum ES og Bretland í samband við Brexit, so missur danska fiskivinnan, sum skilst, nógv fiskirættindi í bretskum sjógvi.

Føroyar ráða sær sjálvum á fiskivinnuøkinum, men áhugavert er at vita, um danska vinnan ella danskir politikarar, embætisfólk ella onnur vilja hava donsk skip hendavegin at fiska, um tey missa rættindi í bretskum sjógvi.

Løgmaður varð spurdur um málið í tinginum, tá munnligir fyrispurningar vóru á skrá, men svaraði ikki. Tí verður hesin fyrispuringur settur.

Á Løgtingi, 24. november 2020

Beinta Løwe Jacobsen